PF LEIF MOHR

Stovnað 1935

# Skrivstovustarv

Søkt verður eftir einum fólki til skrivstovuarbeiði, at byrja skjótast gjørligt. Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði, herundir bókhald, lønir, telefon, tolling v.m.

Talan er um eitt starv við niðursettari tíð, áleið 20-30 tímar um vikuna eftir nærri avtalu. Um tað gerst neyðugt, má umsøkjarin kunna arbeiða meira.

## Vit kunnu bjóða

tær eitt fjølbroytt og áhugavert arbeiði innan skrivstuvuyrkið. Tú kemur at taka tær av alskyns uppgávum. Eisini kunnu vit bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning. Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika at seta títt persónliga merki á arbeiðið. Harumframt eru góðir skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar. Løn eftir nærri avtalu.

## Krøv til umsøkjara

Tað er ein fyrimunir um tú hevur praktiskar royndir innan skrivstovuyrkið. Harumframt er tað ein fyrimunur um tú:

– Hevur skrivstovuútbúgving.
– Hevur kunnleika til Navision.
– Kanst arbeiða sjálvstøðugt
– Hevur góð samstarvsevni.
– Kanst orðna fleiri ting í senn.
– Er arbeiðssom/samur, røkin og fyrikomandi

Vit leggja dent á, at tú hevur áræði og vilja til at gera mun, til gleði fyri teg sjálvan, tínar starvsfelagar og fyritøkuna.

## Meira fæst av vita

um starvið við at venda sær til Hjalmar Jacobsen (hj@lm.fo) ella á telefon 35 12 20

## Umsókn

saman við avritum av próvskjølum og upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera
*P/F LEIF MOHR, Hoyvíksvegur 53, FO-100 Tórshavn, í hendi seinasta lagi 16.06.2008*

**Fyri P/F LEIF MOHR**
**er tað sera umráðandi, at hesi mongu og góðu starvsfólk trívast í fyritøkuni, eins og tað hevur týdning, at vit hava eitt arbeiðspláss, sum er lokkandi fyri arbeiðssom og dugnalig starvsfólk.**

**Støðugt arbeiðir LM við at hava eitt spennandi og mennandi arbeiðspláss, ið er trygd og gott, tá um starvsfólkaviðurskifti ræður. Hetta til gleði fyri allar partar.**

P/F LEIF MOHR - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53 - TEL 35 12 20 - KAMBSDALUR - 530 FUGLAFJØRÐUR - TEL 47 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

# Lærarastarv í Kaldbaks skúla

Kaldbaks skúli søkir eftir einum lærara í tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2008/09 vegna avlopstímar og serligan tørv umleið 24 tímar um vikuna.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- eru fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- verða við áhaldandi at menna skúlan
- er stundisligur og nærlagdur

Skúlanum tørvar lærara, ið m.a. kunnu átaka sær at undirvísa í støddfrøði, alisfrøði, kristni, náttúru og tøkni.

**Førleikakrøv:**
Tann ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Læraralesandi, sum lúka prógv í summar, kunnu eisini søkja starvið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastarvið verður sett sum sáttmálasett starv. Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4. Starvið verður sett sum tíðaravmarkað starv fyri skúlaárið 2008/2009.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v., avrit av prógvum og møguligum ummælum, skulu vera fyrstalærara Ragnari J. Magnussen, Hagagøtu 3 á Argjum, í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. juni 2008 kl. 12.00.

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til Kaldbaks skúla tel 302520 ella 515398.

**Kaldbaks skúli**
180 Kaldbak

Kaldbaks skúli hevur komandi ár um 30 næmingar. Á skúlanum starvast í løtuni 4 lærarar. Í 2003 varð skúlin høvuðsumvaldur og bygt varð afturat verandi skúla. Sera góðar hølisumstøður til næmingar og lærarar.

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

RINGIÐ TEL 312 000 OG FÁIÐ EITT ÓBINDANDI TILBOÐ



CTC-vørumerkið er vælkent hjá føroyingum. Við meira enn 50 árum á føroyska marknaðinum nýtist ikki at siga meira...

Tygum fáa CTC-hitapumpuna hjá Mariu Poulsen.

CTC

Maria Poulsen

Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo